# Felags kristilig bønargonga

**Um 300 fólk, úr fýra ymiskum samkomum, gingu sunndagin takkar- og bønargongu gjøgnum Runavíkar Kommunu. Endamálið var at takka fyri og biðja um Guds signing yvir alt virksemi í kommununi**



*Um 300 fólk samankomin í takkar- og bønargongu í Runavík sunnudagin. Endamálið við bønargonguni er at standa saman um vinnulívsfólk og tey, ið eru sett at ráða. Eisini ynsktu samkomurnar alment at takka Gudi fyri, at kreppuárini fyrst í nítiárunum, so skjótt vendust til gullár, siga fyriskipararnir*

BØNARGONGA

*Orð og myndir: Rúna Sivertsen*

Bønargongan byrjaði við kirkjuna á Glyvrum, gekk síðani gjøgnum Saltangará og út í Runavík, har skriv varð handað býráðum.

Gongan var skipað soleiðis, at steðgað varð við fleiri støð á vegnum og Guds signing biðin yvir alt virksemið í kommununi, bæði andaligt og tímiligt.

Dagny F. Højgaard frá missiónshúsinum á Glyvrum byrjaði við bøn og las ørindini úr fyrra brævinum hjá Timoteusi, har hann áleggur teimum trúgvandi at biðja fyri øllum menniskjum og øllum, ið høgt eru sett.

## Eingin gloymdur

Undan bønarfylginum koyrdi trailari við forsangarum og spælarum. Sanghefti við fleiri enn 30 sangum var býtt út, og sangurin gekk lætt og væl, meðan gingið var gjøgnum bygdirnar, Glyvrar, Saltangará og Runavík.

Jan Jacobsen úr samkomuni, Kelduni, í Skálafirði er ein av fyriskiparunum av hesum sjáldsama tiltaki.

Hann sigur, at endamálið við bønargonguni er at standa saman um vinnulívsfólk og tey, ið eru sett at ráða. Eisini ynsktu samkomurnar alment at takka Gudi fyri, at kreppuárini fyrst í nítiárunum, so skjótt vendust til gullár.

Men ikki bert vinnulívsfólk og tey, ið ráða fyri borgum, vóru við í bønunum hendan serstaka bønardagin.

Hjúnaløg, barnaansingar- og skúlans virksemi, fyrisiting og leiðslur og kirkjur og samkomulív, vóru øll løgd fram fyri hann, sum yvir øllum valdar.

Eisini ynsktu samkomurnar at biðja um verju Guds móti tí ónda, og serstøk bøn varð biðin fyri teimum veiku og teimum, sum er illa fyri sosialt.

## Borgarstjórin takkar

Uttan fyri býráðshúsið í Runavík, var borgarstjórin, Rodmundur Nielsen, saman við býráðslimunum komin at taka ímóti skrivinum frá samkomunum.

Í skrivinum til býráðið, takka samkomurnar fyri ta vælvild, ið verður sýnd andaliga virkseminum, og fyri tað arbeiðið, sum býráðið ger fyri trivnaðin í kommununi.

Eisini vísa samkomurnar á, hvørji bønarevni teirra fyri kommununi eru, og enda tær við at biðja Guds signing og varðveitslu fyri býráðslimunum og familjum teirra.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, takkaði fyri positiva boðskapin í skrivinum. Hann segði, at tað er sjáldan, at býráð og ráðandi verða róst fyri sítt arbeiði, og at býráðið framhaldandi fer at royna at stýra kommuni við skynsamari hond.

Eisini nýtti hann høvið at takka samkomunum fyri tað arbeiðið, tær gera millum børn og ung.

## Uden mad og drikke

Takkar- og bønargongan, sum byrjaði klokkan 6 seinapartin, varð liðug, júst sum ætlað, klokkan 8.

Tá vórðu øll boðin til ein drekkamunn í samkomuhúsinum, Berøa, sum allar samkomurnar í felag høvdu skipað fyri.

Løtan í Berøa var sera hugnalig. Fólk gleddust um væleydnaða tiltakið, góðu køkurnar - og um at síggja hvønn annan.



*Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, takkaði fyri positiva boðskapin í skrivinum, sum allar 4 samkomurnar í oynni hava undirskrivað. - Tað er sjáldan, at býráð og ráðandi verða róst fyri sítt arbeiði, segði hann, og legði aftrat, at býráðið framhaldandi fer at royna at stýra kommununi við skynsamari hond*


## PROFILE - A Development Project for Female Leaders

**Menningarverkætlan fyri kvinnuligar leiðarar**

Kvinnuligir stjórar og/ella leiðarar verða við hesum bodnar at luttaka í verkætlanini: PROFILE

Verkætlanin miðar eftir, at byggja upp altjóða netverkssambond millum kvinnuligar leiðarar úr vinnu, felagsskapum og myndugleikastovnum fyri at styrkja tær í sínum virksemi.

***Hvørjar kvinnur kunnu luttaka ?***

- Kvinnuligir leiðarar. Leiðarar í vinnufyritøkum verða raðfestar fremst, men áhugi er avgjørt eisini fyri leiðarum í felagsskapum og myndugleikastovnum.
- Kvinnur, ið hava áhuga at byggja upp eitt netverk til víðkan av altjóða samstarvi.

*Og, sum:*

- síggja útflutningsmøguleikar hjá fyritøkuni arbeitt verður í - ella at hjálpa øðrum fyritøkum við útflutningi.
- síggja vinnuligt og mentanarligt fjølbroytni sum møguleikar at menna hugskot og mannagongdir.
- hava kunnleika til KT-samskifti og enskt mál.

***Luttakarar koma frá:***
Svøríki, Finnlandi, Føroyum og Russlandi. Skottland og Noreg taka lut í verkætlanini sum eygleiðarar og eftirmetarar.

***Tíðarætlan og kostnaður***
Byrjað verður í august-september 2003 og endað verður í november 2004.
Um 1.500,- kr. (200 evrur) fyri hvønn luttakara. Íroknað er royndarætlan, ferðing og uppihald í sambandi við altjóða ráðstevnir og royndir uttanlands.

Ynskir tú faldiblað um PROFILE-verkætlanina ella fleiri upplýsingar, ert tú vælkomin at venda tær til føroysku stýrislimirnar í verkætlanini:
Janet Fríða Johannesen, tel 31 96 85/21 22 11.
Kjartan Kristiansen á Menningarstovuni, tel 35 31 00.

***Umsóknir til luttøku***
Umsóknir við c.v. skulu í seinasta lagi 12. august sendast til Menningarstovuna, Bryggjubakka 12, Postboks 258, 110 Tórshavn ella sendast til teldupost: jj@atlanticon.fo.

Team 85

PROFILE - A Development Project for Female Leaders er ein Northern Periphery verkætlan. Northern Periphery tiltakið er ES-heildar-menningarætlan, ið fevnir um Skottland, Svøríki, Finnland, Noreg, Ísland, Grønland og Føroyar. Herumframt er Barentsøkið í Russlandi knýtt at verkætlanini. Vinnuframagrunnurin hevur stuðlað føroysku verkætlanini.




**Til**
**Runavíkar Býráð**
**600 Saltangará**

Sunnudagur 3. august 2003

Vit ynskja við hesum skrivi at geva til kennar takksemi okkara fyri ta vælvild, ið býráðslimirnir hava víst mótvegis andaliga virkseminum í komununi.

Tit eiga stóra tøkk uppiborna fyri arbeiðið at útvega borgarnum reint og gott vatn. Líkaleiðis fyri teir góðu karmar, ið vinnulívið hevur at virka undir.

Arbeiðið at fáa allar bygdirnar vetrarfriaðar, og tað, ið higartil er gjørt fyri at fríðka um í komununi, er at frøðast um.

Trivnaðurin og barnaansing hoyra saman. Nýggji barnagarðurin er trivnaðarbati í munar, takk fyri tað!

Bøn okkara er at Jesu navn og boðskapur Bíbliunar skal eiga rúmd innar karmarnar í barnaansingini hjá komununi.

Vit leggja tykkum býráðslimir og familjur tykkara fram fyri Harran við tøkk og bøn um, at Hann skal varveita og signa framtíð tykkara.

Ásannandi at vit, játtandi Guds børn, mangan hava svikið uppgávu okkara - lív og atferð okkara eru mangan ikki í samsvar við játtanina - er tað at vit hava gingið ígjøgnum bygdirnar Glyvrar, Saltangará og Runavík.

Í vón um at Guds børn vakna til álvarsemi, soleiðis at vitnisburðurin um kærleikan og náðina í Jesusi Kristi gjørdist meira sjónligur hjá Guds børnum, í hjúnaløgum, innan kirkju- og samkomulív, innan skúlaverk og barnaansing, innan fyrisiting, leiðslu og á virkjum og fyritøkum.

At enda: Inniliga bøn okkara til Harran er, at Hann má geva tykkum framhaldandi skynsemi og vísdóm til at standa ímóti, tá ið andaligar niðurbrótandi kreftir biðja um loyvi til at festa røtur í nærumhvørvi okkara.

Harrin signi og varveiti tykkum býráðslimir!







*Bønargongan byrjaði við kirkjuna á Glyvrum, gekk síðani gjøgnum Saltangará og út í Runavík, har skriv varð handað býráðum. Á vegnum varð steðgað á fleiri støðum og Guds signing biðin yvir alt virksemið í kommununi, bæði andaligt og tímiligt*



*Undan bønarfylginum koyrdi trailari við forsangarum og spælarum. Sanghefti við fleiri enn 30 sangum var býtt út, og sangurin gekk lætt og væl, meðan gingið var gjøgnum bygdirnar, Glyvrar, Saltangará og Runavík*



*"Eg nígi tí niður í bøn til tín, Gud ". Ein sjáldsom sjón við býráðshúsið í Runavík sunnudagin. Um 300 fólk á knæ, meðan seinasta ørindi av tjóðsanginum verður sungið*